# Endurskoðan er neyðug

*Málið um Signar á Brúnni hevur greitt víst, hvussu alenyðugt tað er at endurskoða lóggávuna á økinum, heldur Anfinn Kallsberg, løgmaður*



*- Tað ber ikki til, at vit ala tíðina skulu trilva okkum fram, heldur løgmaður*

Jákup Mørk

Í blaðnum í gjár stóð at lesa, at Bjørn á Heygum hvassliga fanst at frídømingini av Signari á Brúnni, fyrrverandi landsstýrismanni.

Millum annað vísti hann á, at hetta mál kann skapa fordømi fyri, at landsstýrismenn at kalla fáa frítt spælirúm uttan at skula taka fyrilit fyri teimum játtanum, sum løgtingið annars hevur samtykt.

**Greiðari mannagongdir**

Hasi orðini frá Bjørn á Heygum havi eg sum so onga viðmerking til. Hatta er ein juridiskur spurningur, sum eg sum so einki hava at siga um, vóru fyrstu orðini frá Anfinni Kallsberg, løgmanni, tá vit spurdu um hansara fatan av málinum.

Løgmaður segði tó víðari, at eftir hansara fatan hevði málið um Signar á Brúnni týðuliga staðfest, hvussu neyðugt tað er við eini endurskoðan av lógarkarminum á økinum.

- Trupulleikin er, at tað á fleiri økjum eru konfliktir ímillum stýrisskipanar- og játtanarlóggávuna, og hetta málið er bert eitt dømi um henda trupulleika, sigur løgmaður. Víðari sigur hann, at eigur at verða soleiðis fyriskipað, at greiðar mannagongdir fáast á økinum, soleiðis at sleppast kann undan líknandi trupulleikum í framtíðini:

- Vit nýta alt ov nógva tíð og orku upp á at loysa trupulleikar, sum tað skuldi verið púrasta óneyðugt at komi í. Tað, sum tørvur er á, er at fáa púrasta greiðar mannagongdir frá A til Z, soleiðis at tað eingin ivi er um, hvussu mál skulu handfarast. Hetta eigur at vera galdandi frá teirri løtu, at málið stingur seg upp á einum stovni og allan upp ígjøgnum tað politisku processina. Tað ber ikki til, at vit alla tíðina skulu trilva okkum fram og fara skeivur av hvørjum øðrum, sigur Anfinn Kallsberg at enda.

# Fyrireikingar



Í løtuni verður arbeitt við at gera ferjulegurnar við Gomlurætt og í Skopun til reiðar, so tær eru førar fyri at taka ímóti nýggju Sandoyarferjuni, tá henda verður sett í sigling. Eisini í Hesti skulu fyrireikingar gerast til nýggju ferjuna, og á myndini omanfyri sæst, hvar Sandoyarferjan eftir ætlan skal leggja at.


Jazzfestivalurin

17. Tórshavnar Jazz, Fólka & Blues Festival 2000

Í Norðurlandahúsinum




**Mikudag 9. august**, KR. 80,-

**HALLAS TRAVEL** Bjørn Thoroddsen (IS)

**JASSARNIR** (FO)
**J.S.& Bach** *Jóhannes Andreassen & Stamen Stantshev (FO)*
**Trio 2/ASSIMILATION** Arne Forchammer (DK)
**Trevor Hunter Folk Duo Shetland**
**IVORY v/ Eivør Pállsdóttir og John Purcell**

**Hósdag 10. august**, KR. 150,-

**STAVANGER GOSPEL CHOIR** (N)

**A Tribute to Louis Armstrong** *GR/IS/F0/DK trad. Jazz*
**SWINGING LINK v/Jens Nørholm**
**Trevor Hunter Folk Duo Shetland**
**Kurts Blues Band Åland**



**Fríggjadag 11. august**, KR. 100,-

**LOST PILGRIMS** v. Jørgen Dahl

**JASSARNIR** (FO)
**GREEN GATE** v. Holger Laumann & **PLÚMM**
**PÁLL finnur PÁLL** (FO)
**SQUARE ONE Blues trio (N)**



**Leygardag 12. august**, KR. 150,-

**LIS SØRENSENS GROUP** (DK)

**JASSARNIR** (FO)
**Coco Nelegatti y su QUINTETO**
**ARRABAL arg./tysk Tango ork.**
**Trevor Hunter Folk Duo Shetland**
**SOFIA FINNILÄ, vokal (**FIN) v. **JAZZOASIS** (FO)




**ATGONGUMERKI TIL ALLAR DAGAR: KR. 360,-**
**Atgongumerki fáast í Norðurlandahúsinum, tlf. 317900**
**og á Kunningarstovuni, tlf. 315788**

Fyrivarni verða tikin fyri broytingum




# Tey velja rapp



*Tað er serliga millum ungar dreingir, at Eminem hevur sín dygga viðhaldsskara*

*Partur av rapp-tekstum, sum ljóma inni í kamarinum hjá tannáringum er bæði blóðigur, harðligur og kvinnu-hatskur. Og ovast á hitlistunum. Í USA rópa summi varskó, meðan onnur mæla til at sláa kalt vatn í blóðið. Eisini í Føroyum er rapp væl við.*

Niclas Johannesen

Fyri tveimum árum síðani - og fyri fyrstu ferð nakrantíð í amerikansku tónleikasøguni - var country tónleikur skúgvaður av ovastu søluhillunum.

Har dusaði rapp-tónleikurin sær. Tað fitta - country - hevði tapt móti tí ljóta - rappinum. Henda lutfalsliga unga sjangran seldi 81 milliónir fløgur, kassetubond, og plátur, meðan country-sjangran seldi 72 milliónir í 1998. Vøksturin innan rapp-tónleikin var heili 31 prosent samanborið við tvey prosent innan country-tónleikin og seks prosent vøkstur innan rocksjangruna.

**Harðligt**

Fyrstu vikuna í juni ár 2000 kom hvíti rapparin Eminem við sínum harðligu tekstum út við nýggjari fløgu og skúgvaði alt fyri eitt bubblegummi drotningina Britney Spears út á síðulinjuna. Eminen liggur í hesum døgum eisini ovaliga á føroyskum hit-listum so sum „15 Teimum Bestu“.

Útgávan “The Marshall Mathers LP” er fylt við haturi, neyðtøku og morði. Og mest seljandi fløgan fyrstu vikuna í juni. Eminem sló rættiliga ígjøgnum við lagnum “Slim Shady” (Slim Shady er ein fiktivur persónur, líka sum Esmar Eysturoy, uttan at hesir báðir tó líkjast serliga nógv, blðm.) og var ein av teimum fáu hvítu rapparunum, millum fyrst og fremst svartar gangstar rapparar so sum Dr. Dre, Snoop Dog, Tupac Shakur (skotin), og Notorius Big (doyði í vanlukku).

Hip-hop er kollveltingar rødd ungdómsins, segði rapparin Jay-Z í eini grein í Time Magazine fyri árum síðani. Hetta er tað, fólk vilja hava, legði hann aftrat. Hann hevur helst rætt. Hip hop er í dag at hoyra allastaðni. Á filmum, radiostøðum og lýsingum fyri alskyns lutum. Tað er serliga ágangandi, tunga beatið, sum tey ungu fella fyri.

Í moral-fikseraða USA eru tey tó mong, sum rópa varskó. Nakað av rappinum eggjar nevniliga beinleiðis til ólevnað og kriminalitet. Fyri at halda fast við Eminem so skrivar hann beinleiðis um at neyðtaka mammu sína.

Tað fær valla verið verri.

Foreldur gerast heit um skallan og ivast í, hvussu tey skulu takla, at Eminem og hansara líkar ljóma inni í kamarinum hjá tannáringa soninum/dótrini. Í Norðuramerika eru allar fløgur, ið innihalda eiðir og annan ónærisligan tekst merktar við ávaringum. So øll eru fullgreið um, at hetta er ikki ein sunnudagsskúla fløga.

Tey serkønu hava síni boð til foreldur. Men tey eru ikki øll í samsvari við hvørt annað.

Eini boð eru, at foreldrini skulu bara sjálvi lurta eftir hesum fløgunum. Tí ikki allur tónleikur er líka radikalur. Haraftrat verður eisini mint á, at seinastu 50 árini hava foreldur øst seg upp um moralin hjá tannáringum - heilt síðani ungdómsmentanin vaknaði við undirlívsvreiggjunum hjá Elvis. Hetta við foreldraóttanum mótvegis børnunum er líkasum ein náttúrulóg.

**Fjáltur**

Foreldur hava syfst í bylgjum av moralskum fjálturi í 50 ár, vísir eitt nú professarin Martin Laba á Simon Fraser universitetinum í USA á. Sjálvur er hann sannførdur um, at ússaligasta loysnin er sensurur. Tað hevur ongantíð dugað, og tað fer aldrin at duga, sigur hann.

- Dagsins børn liva í einum elektroniskum umhvørvi, sum er fullkomiliga ógjørligt at regulera. Tað, børn hava fyri neyðini, er “media-lærdómur” soleiðis at tey ungu kunnu verja seg sjálvan mótvegis ágangandi boðskapum, sum mediaheimurin sendur í stríðum streymum, allatíðina, sigur Laba professari.

- Tað finst ein óndur heimur har úti, fyltur við ábyrgdarleysum menniskjum og loysnin er at vera snildur og kritiskur, leggur Martin Laba aftrat.

Haraftrat er Martin Laba fullvísir í, at innan popptónleik koma orðini í aðru røð aftan fyri beatið í sangunum. Í londum, har enskt er fremmandamál, er hetta upp aftur meira galdandi. Hip-hop er list - ikki veruleiki, sigur hann. Tað er list, sprottin í kjalarvørrinum á einum rasistikum, fátæksligum samfelag, har marknaðurin og kapitalurin ráða.

Hann vísir eisini á, at rapp hevur eitt rættiliga dygt søguligt kjølfesti og sigur, at um hann hevði børn, so hevði hann ynskt, at tey lurtaðu eftir rapp heldur enn eftir Britney Spears.

**Senurur nyttar onki**

Eisini sálarfrøðingurin og professarin Kim Schonert-Reichl er samd í, at sensurur nyttar onki. Hon heitir á foreldur um at finna útav, hvussu stóran leiklut - og hvønn - leiklut rapp-tónleikur hevur í lívinum hjá teirra børnum. Hon mælir foreldrum til at práta við teirra børn.

Víst verður eisini til bókina “Metal Heads”, sum viðger, hvussu ung brúktu/brúka heavy metal tónleik. Høvundurin Jeffrey Jensen kemur fram til, at tannáringar brúka tónleikin at regulera sinnislop (mood swings) við.

Tónleikurin hevði ta ávirkan á tey ungu, at tey gjørdust minni ill eftir at hava lurtað eftir hesum villa tónleikinum. Kanningar, sum Arnett, lærari a Lærda Háskúlanum í Maryland, hevur gjørt vísa, at ung serliga lurtaðu eftir hesum tónleiki, tá tey vóru ill. Og hetta var ein púra vandaleysur háttur at vísa teirra øði.

Arnett er tó ikki samdur við teimum, ið seta líkheitstekin millum Elvis og hansara beinsveiggj og so harðskaps-eggjandi rapptónleikin. (Gangster) Rapptónleikur gevur eina forskrúvaða versjón av, hvussu kvinnur skulu vera viðfarnar, sigur hann.

Martin Laba er samdur, men sigur, at tað hava eisini aðrar tónleika sjangrur gjørt frammanundan. Og hann hevur ein universitetsklassa fullan av ungum fólki, sum eru uppvaksin við gangsta-rapp tónleiki, men sum kortini liva í kensluligari javnvág. Hann vísir á, at tey flestu ungu liva seg fullkomiliga inn í sjálva rappmentanina og har er harðskapur bert ein lítil partur í tí stóru myndini.

Heldur enn at forbjóða, eiga fólk at práta um tað.

**Sum foreldrini**

Sálarfrøðingurin Schonert-Reichl, vísir eisini til kanningar, ið vísa, at í síðsta enda so fáa børn sum oftast somu lívsvirðir sum teirra foreldur.

Tað snýr seg um at geva teimum gott í beinið, sigur hann.

Somu kanningar vísa eisini, at børn, har foreldrini veruliga lurta eftir teimum, hava betur kjans at menna ein sunnan moral enn børn, har foreldur tala í boðshátti og dialogurin er einsrættaður.

Í síðsta enda er tað helst júst tað, rapp-tónleikurin snýr seg um. Røddir ongin hoyrdi, fyrr enn trummubeatið bankaði boðskapin inn í hvønn krók.




*Hendan myndin er tikin sama dag sum nýggja útgávan hjá Eminem kom á heimsmarknaðin. Hann seldi milliónir eftir eini løtu*




*Eminem er mest seljandi rapp-tónleikarin í hesum døgum. Samstundis, sum hann selir fleiri milliónir fløgur, verður spældur non-stop á MTV og liggur ovarliga á 15 Teimum Bestu, so verður frá fleiri síðum eisini harðliga funnist at hansara tekstum, ið eitt nú leggja eftir samkyndum.*